UTTAN ÚR HEIMI

## Dýrari bensin

Ta seinastu tíðina er bensinið dýrkað nógv í Danmark, og í gjár hækkaði prísurin aftur. Hesaferð var hækkingin 24 oyru fyri liturin.

Hjá teimum stóru oljufeløgunum sum Shell, Statoil og Texaco kostar bensinið nú 9,16 krónur fyri liturin, meðan prísurin hjá teimum sokallaðu lágprísfeløgunum liggur ímillum 8,91 og 9,06 krónur. Tað eru tó minni enn so allar bensinstøðirnar, sum selja bensinið so dýrt. Í Danmark hevur prískappingin verið sera hørð í seinastuni, og tí kunnu bilførarar summastaðni í landinum fáa bensinið fyri umleið hálva aðru krónu minni enn aðrastaðni í landinum. Serliga í Norðurjútlandi hevur prískappingin verið sera hørð.

Herfyri var bensinprísurin eisini oman fyri níggju krónur, og tá fyrireikaðu fleiri oljufeløg sínar støðir til at lýsa við prísum oman fyri tíggju krónur. Her var neyðugt við útbygging, tí prísskeltini á støðunum vóru ikki gjørd til prísir oman fyri 9,99 krónur.

## 104.000 færri størv

Í Bretlandi hevur Gordon Brown, fíggjarmálaráðharr, lagt fram eina fíggjarætlan fyri tey næstu trý árini, og hon ber millum annað í sær, at ein hópur av almennum størvum skulu skerjast burtur.

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at í 2008 verða 104.000 færri almenn størv enn nú. Hann roknar við, at bretski ríkiskassin fer at spara einar 250 milliardir krónur, og pengarnar ætlar stjórnin at nýta til skúlaverkið, vælferðarskipaninar og til verjuna. Samstundis er avgjørt, at fólk skulu ikki gjalda meiri skatt enn nú.

Hetta er tann triðja trý ára fíggjarætlanin hjá Gordon Brown, síðani hann gjørdist fíggjarmálaráðharri í 1997. Serligur spenningur er hesaferð, tí ætlanin gevur eisini eina ábending um, hvat Labour ætlar at leggja dent á í næsta valstríðnum. Harafturat er tað alment kent, at Gordon Brown vil fegin sleppa at taka við eftir Tony Blair, og tí fylgja eygleiðarar væl við tí, sum hann ger og sigur, skrivar Reuters.

## Vatnflóð í Svøríki

Tað regnaði so illa í Småland í Svøríki um vikuskiftið, at í býnum Værmano var vandi fyri, at áin Lagan fór at floyma inn í býin.

Mánadagin vaks áin støðugt. Nógvastaðni fór hon upp um áarbakkarnar, og umleið 60 vegir máttu steingjast, tí teir stóðu undir í vatni. Myndugleikarnir sendu bjargingarlið og hermenn til Småland at umvæla byrgingarnar, og kommunan í Væramo keypti 3.000 sekkir av sandi, sum fólk so kundu fáa. Harafturat kundu fólk fáa pumpur frá kommununi.

Myndugleikarnir í Smålandi søgdu í gjár, at Lagan er stór enn, og at vatnið er heldur ikki minkað í fleiri áum, sum renna í hana. Teir vænta kortini, at byrgingarnar fara at halda, so tað slepst undan vatnflóð í sjálvum Vænamo.

# Bush Bush leggur ikki í at halda røðu fyri teimum svørtu

**Viðurskiftini ímillum George W. Bush, forseta og teir svørtu leiðararnar í USA hava ikki verið góð, men nú ber av**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er gamal sigur, at forsetin er høvuðsrøðari á árligu ráðstevnuni hjá størsta svarta borgararættindafelagsskapinum í USA, NAACP, men soleiðis verður ikki í ár. Felagsskapurin heldur ráðstevnu í morgin, og George W. Bush, forseti hevði fingið innbjóðing til at halda høvuðsrøðuna. Men forsetin tók ikki av.

Undir valstríðnum fyri fýra árum síðani var Bush høvuðsrøðari á ráðstevnuni hjá tí 95 ára gamla felagsskapinum, men síðani hevur hann ikki hildið røðu har. At hann heldur ikki ger tað í ár kemst sambært einum talsmanni hjá Hvítu Húsunum av, at forsetin hevur so nógv at gera.

Sjálvur dylir forsetin ikki fyri, at tað er ikki øll orsøkin. Í einari fráboðan sigur hann, at hann hevur so at siga einki samband við NAACP.

– Tit hava hoyrt, hvat tey siga um meg, og hvat tey kalla meg, sigur forsetin í fráboðanini.

Demokratiska forsetavalevnið, John Kerry, skal halda høvuðsrøðuna hjá ráðstevnuni hjá NAACP. Umleið 12 prosent av amerikanska fólkinum eru svørt, og vanliga atrkvøða 90 prosent av teimum svørtu fyri demokratunum.0

# Fyrsta samrøðan í 40 ár



*Fyri fyrstu ferð í næstan 40 ár hevur fyrrverandi amerikanski hermaðurin Charles Robert Jenkins tosað við skyldfólk síni í USA. Tað hendi mánadagin, tá hann tosaði við eitt av skyldfólkunum í telefon úr Indonesia.*

*Jenkins er giftur við einari 45 ára gamlari japanskari kvinnu. Norðurkoreanskir agentar burturfluttu hana í 1978 og fóru til Norðurkorea við henni. Har giftust hon og Charles Roberts Jenkins. Fyri tveimum árum síðani sluppu hon og tær báðar døturnar aftur til Japan, men Jenkins sjálvur varð verandi eftir í Norðurkorea. Hann er bangin fyri at verða útflýggjaður USA til rættarsókn, tí hann rýmdi úr amerikanska herinum.*

*Mánadagin kom hann til Indonesia at hitta konuna og døturnar. Tað bar til, tí Indonesia hevur ikki sáttmála við USA um at útflýggja fólk, sum hava brotið amerikanska lóg*

*Mynd: Reuters*

# Vilja hava Noreg upp í ES

**Týskararnir vilja fegnir hava øll tey evropeisku londini upp í ES, men Noreg stendur ovast á listanum, tí norðmenn eiga pengar**

ES
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er nú ikki bara gestablídni, sum ger, at týskarar serliga vilja hava Noreg upp í Evropasamveldið. Teir norsku pengarnir hava stóran týdning í hesum sambandi.

Í einari kanning, sum tíðarritið Chrismon hevur gjørt, sæst, at 94 prosent av teimum spurdu týskarunum vilja fyrst hava Noreg upp í ES. Á øðrum plássi er Sveis. Hetta er ikki av tilvild, tí kanningin vísir, at týskararnir vilja fyrst og fremst hava fatur á londum, sum hava pengar, og sum kunnu vera við til at gjalda.

Listin vísir eisini týðiliga, at tey fátæku londini eru ikki so áhugaverd. Niðast á listanum eru Hvítarussland og Serbia-Montenegro.





*Savnsmynd*

# Hol á fleiri hús

**Eygnavitni á Eiði greiða frá, at grót fór um alla bygdina mánadagin, tá sprongt varð úti í Gerðinum á Eiði. Eygnavitni siga, at hol er komið á fleiri tekjur**

SPREINGING
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Aftaná fyrstu spreingingina tíðliga seinnapartin fór grót um alla bygdina, og tá var onki ávaringarljóð. Síðani gekk ein løta til næsta skotið, heldur ongin ávaring, og aftur hesuferð kom grót oman ímillum og á húsini, sigur eygnavitnið á Eiði.

– Síðani ringdi eg til løgregluna í Eysturoynni, og teir søgdu so, at teir skuldu tosa við spreingimeistaran. Aftaná tað varð so ávarað áðrenn skotini, men har kom aftur grót sendandi gjøgnum luftina. Tá tað síðsta skotið varð latið av um kvøldið, kom onki grót oman í bygdina, sigur viðkomandi, sum var til staðar allan dagin, tá sprongt varð.

– Frá løgreglustøðini søgdu teir, at tað var óløgligt at spreingja uttan at ávara, og teir skuldu so steðga tí beinanvegin. Men øll her úti á Bø mugu ringja til tryggingina og fáa skaðarnar dekkaðar. Grót fór jú á fleiri tekjur allan vegin úteftir. Hjá einum í grannalagnum eru fýra hol komin á tekjuna - tvey á húsatekjuna og tvey á garasjuna, sigur eygnavitnið.

– Tað seinna skotið, onki ávaringarskot, tá var ein steinur komin akkurát har, sum ein smádrongur plagar at spæla hvønn dag - og hesin steinurin var farin niður í asfaltið, so kraftugt var tað, sigur viðkomandi.

## Politi onga fráboðan

– Hatta kenni eg onki til, er fyrsta viðmerkingin frá vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík um spreingingina á Eiði mánadagin.

– Tað er heilt ótrúligt, at tað ikki er meldað til politistøðina, sigur vakthavandi.

– So hava teir sikkurt valt ikki at blandað løgregluna uppí, soleiðis at teir standa betur í mun til tryggingina, sigur vakthavandi.

– Vit eru ikki serliga glaðir fyri, at fáa hetta at vita eitt døgn aftaná. Hvat skulu vit brúka tað til? Í fall at tað eru nøkur ting, sum skulu rættast, so kunnu vit fáa Arbeiðseftirlitið út. Tað er mest Arbeiðseftirlitið, sum skal hyggja har. Um teir meina, at sak skal koyrast móti viðkomandi, sum hevur ábyrgd, so skriva teir eina sak um tað, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík.

**-hkm**

## Onki spreingiloyvi

– Vit spreingja ikki sjálvir. Tað mást tú spyrja spreingimeistaran um. Hann spreingir fyri okkum, men vit hava onki spreingiloyvi. Men tað er so øgiliga ringt at rokna út, hvussu grótið brotnar, so tað er ringt at hava við at gera, sigur Jóhan Joensen, sum stendur fyri arbeiðinum, og sum hevur givið spreingiarbeiðið til Hentze Entreprenørar.

– Jú, ávaringarljóð varð brúkt. Tað siga tey, at tað varð brúkt, men um tey hava hoyrt tað, tað veit eg ikki. Vit brúktu ein lastbil at geva ávaringarljóð við. Og eg hoyrdi hann so um alla bygdina, tá eg fór at vita, aftaná prát var um, at fólk ikki hoyrdu ávaringarljóðið, sigur Jóhan Joensen.

– Men nú til endan var tað komið í rættlag. Tað síðsta var fínasta slag, sigur Jóhan Joensen.

**-hkm**

**Framhald á s. 4**


# Kall kallar KT fólk

Virksemið á Kalli økist alsamt.
Tí tørvar okkum KT starvsfólk.

Arbeiðið fevnir m.a. um hesi øki:
- Netumsiting
- Umsiting av kervisskipanum, t.d. Windows
- Umsiting og menning av dátagrunnum, m.a. Oracle
- Umsiting av støðisskipanum, t.d. SQL server, Navision osfr.
- Tekniska kundarøkt
- Tekniska dokumentasjón
- Menning av nýggjum tænastum

Vit hugsa okkum KT fólk, sum:
- Eru løtt at arbeiða saman við og eru góðir liðspælarar
- Læra skjótt
- Eru fleksibul
- Duga at gera tað fløkta einfalt
- Brenna fyri arbeiðinum
- Vilja læra meira
- Kunnu veita góða kundarøkt
- Sýna røkisskap

Vit hugsa okkum at fakliga hevur tú arbeiðsroyndir innan nøkur av nevndu økjum, ert datamatikari, verkfrøðingur, sjálværdur ella líknandi.

Vit á Kalli kunnu bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning í einum dynamiskum umhvørvi. Stutt sagt skalt tú duga við tólum og fólkum á einum arbeiðsplássi, har tað gongur skjótt fyri seg. Lønin verður ásett eftir førleika, útbúgving og royndum. Starvið verður sett skjótast til ber.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til: Kall, Óðinshædd 2, Postsmoga 3299, 110 Tórshavn og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9. august 2004.

Hevur tú spurningar um starvið, kanst tú ringja til tekniska stjóran, Martin Paula Jacobsen á telefon 502071.

*Kall er ein fjarskiftisfyritøka, ið bjóðar tænastur innan GSM, vanliga telefoni, IP-net og ADSL.*
*Í 2003 seldu vit fyri 35 mió.kr. Á Kall arbeiða 14 fólk.*

kall
20 20 20